


# Útvarpið og Rás2 viðgera nýggja oljubók í morgunsendingum

Deil:

**Jan Müller**

30.11.2014 - 20:32

Oljan.fo

Í sambandi við at bókaverkið “OLJAN – føroysk vinnu- og samfelagsmenning í 25 ár”, kemur út týsdagin 2. desember, viðgera tær báðar útvarpsstøðirnar, Útvarpið hjá Kringvarp Føroya og Rás2 hjá Miðlahúsinum, nýggju bókina í morgunsendingunum mánamorgun. Finnur Koba og Heri Simonsen tosa við teir báðar rithøvundarnar, Jan Müller og Trónd Djurhuus. Sendingin í útvarpinum verður kl. 8.30 og í Rás2 klokkan 9.15.

Í sendingunum verður m.a. varpað ljós á føroysku vinnu- og samfelagsmenningina, sum av álvara byrjaði, eftir at Atli P. Dam, løgmaður og Poul Schluter, forsætisráðharri skrivaðu undir undirgrundaravtaluna í 1992.

Eisini verður greitt frá upprunanum til hesa fyrstu oljubókina. Enn ein bók er í umbúnað. Hon kemur út um umleið eitt ár og snýr seg um drúgvu samráðingarnar við danir og bretar um ávikavist rættin til ráevni í føroysku undirgrundini og um ásetan av undirgrundarmarkinum mótvegis Bretlandi.

Aftrat oljubókunum verður eisini arbeitt við eini verkætlan at byggja upp eitt dátusavn, sum fer at skráseta og goyma alt føroyskt olju- og orkurelaterað tilfar.

Oljubókin verður løgd fram á almennari móttøku í Perluni týsdagin kl. 17. Og somuleiðis á bókasavninum við Løkin í Runavík hósdagin 4. desember kl. 17.